# ítróttur

Nr. 75 • hósdagur • 21. apríl 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

KÍ-Skála 0-2 (0-1):

# Nú eru skálamenn einsamallir

**Fyrsti sigurin hjá Skála í Klaksvík varð vunnin, tá ið skálamenn vóru skjótari og hugflogsríkari enn ógvuliga ráðaleysu og ótolnu klaksvíkingarnir**

KÍ-SKÁLA

*Jóannes Hansen*



*Skála er nú aftur oddalið í bestu deildini. Hesum syrgdu teir fyri, tá teir vunnu útsetta dystin í Klaksvík 2-0*

*Mynd: Bárður Lydersen*

Skála er á sama plássi, sum teir vóru undan summarsteðginum í fjør. Teir eru oddalið, og tað kann væl fara at vísa seg, at teir fara at vera drúgvir í fremstu røð. Teir hava fleiri streingir at spæla uppá, enn teir høvdu í fjør, og nýggi málverjin vísti seg í fyrstu royndini at vera sannur brandur. Hann verður fongur hjá skálamonnum. Ivamálið er, hvussu ofta hann fer at vera burturi frá. Um hann støðugt fer at vísa sjónleikaraevnini, sum hann vartaði upp við í góðveðrinum týskvøldið, so eigur hann fleiri leikbann fyri framman!

KÍ er ovari á støðutalvuni, enn teir vóru inntil endan á kappingarárinum í fjør. Og fyrsta korterið megnaðu teir at kroysta gestirnar uttan av Skálafjørðinum av álvara. Atli Danielsen og Høgni Madsen høvdu gott tak á miðvallar spælinum, Kristoffur Jacobsen í høgru og Heðin á Lakjuni komu fleiri ferðir ígjøgnum í borðunum og løgdu innfyri, og onkrir góðir møguleikar vóru. Eftir frísparksinnlegg og Ova Nysted stútari sendi skálamaður í egið tvørtræ, tá ið hann royndi at rudda burtur. Erling Fles fluktaði uppum úr góðari støðu eftir innlegg úr høgru, og Vlada Filipovic í málinum bjargaði meistarliga, tá ið hann tveitti seg niður og við vinstru hond, eftir góða skotroynd frá Erlingi eitt sindur til høgru, beindi bóltinum til horna.

Skálamenn fótaðu sær so við og við, og síðstu fimm korterini gekk tað mesta fyri seg eftir teirra treytum. Á miðvøllinum vóru teir í diamant uppstilling og tættir. Liðformaðurin, Pauli G. Hansen, røkti verjukenda sentrala leiklutin, og Bjarni Jørgensen framrættaða plássið. Iulian Florescu staðfesti enn eina ferð á vinstra vongverja, at hann er ein tann besti bóltspælarin í landinum, og Jónhard Frederiksberg og Bogi Gregersen vóru á toppinum støðug hóttan ímóti tungu miðverjunum hjá heimaliðnum.

Eftir einfaldar eitt tvey samanspælingar mitt fyri hevði Jónhard Frederiksberg longu verið tvær ferðir inn í KÍ brotsteiginum, áðrenn Skála fekk hol á. Serliga í seinna førinum var talan um so stóra søpling, at tað næstan ikki kann sigast frá tí. Jónhard hevði mesta partin av KÍ hálvuni fyri seg sjálvan, og Karstin Joensen var komin út á brotsteigarmarkið, tá ið bólturin eftir skotroyndina, ella hvat tað skal nevnast, fór út til innkast!

Málið, sum bar við sær, at tað, ið eftir var, gekk fyri seg eftir Skála floytuni, kom í 25. minutti. Miðvallarin í høgru, Nenad Stankovic, streyk til baklinjuna, innleggið fór aftur um handara stólpan, og so endaði hann hjá miðvallaranum í vinstru, sum á brotsteigarmarkinum, fekk tíð at temja og medda til, hóast fleiri klaksvíkingar vóru í nánd av honum. Tað sang í nettakinum við nærra stólpan, og síðstu løtuna av fyrra umfarinum var tað fleiri ferðir um reppið, at Skála økti.

### Ótolið og uttan hugflog

Klaksvíkingar tóktust eftir steðgin hava viljan, sum skuldi til fyri at koma afturíaftur. Men í 58. minutti oyðiløgdust fyritreytirnar heilt. Eftir langa Skála framlegging snittaði Kristoffur Jacobsen, sum eftir steðgin var vongverji í høgru, bóltin upp um Ova Nysted, ið tóktist at hava tak á. Jónhard Frederiksberg gjørdist púra leysur, rak í brotsteigin og lyfti upp um KÍ málverjan, og so var fagnaðurin í skýlinum óførur.

KÍ royndi at trýsta og trýsta, men tað var óvanliga fátækt. Í staðin fyri at hava tol og varðveita bóltin í roynd at mynda spælið og álop, so var tað oftast soleiðis, at miðverjarnir báðir løgdu langar sendingar fram í borðini. Skálamenn, sum vóru sera skilagóðir í verjuni, vunnu í flestu førunum nærdystirnar, og sentralu KÍ miðvallararnir, sum í uppbyggjandi partinum høvdu leiklutin sum áskoðarar, megnaðu ikki at seta seg ígjøgnum og vinna returbóltarnar. Heðin á Lakjuni, Hjalgrím Elttør og Erling Fles eru serliga skjótir spælarar, men tað tóktist ikki sum um, at KÍ hevði avrádda spæliætlan, sum gekk út uppá, hvussu hesar dygdirnar skuldu koma til sín rætt.

Í Skálabrotsteiginum vóru onkrar spentar støður, og Hjalgrím Elttør hevði gyltan møguleika, tá ið hann varð spældur blankur í vinstru, men í staðin fyri at seta á málið og smekka til, so valdi hann at traðka á bóltin, og so var tann møguleikin burtur.

Í hinum endanum var fleiri ferðir um reppið, at Skála økti um leiðsluna. Besta møguleikan fekk Nenad Stankovic, tá ið hann gjørdist púra blankur, men Karstin Joensen bjargaði. Tað mundu skálamenn kortini leggja vertin á. Teir vunnu fyri fyrstu ferð nakrantíð landskappingardyst í Klaksvík, og nú eru teir einsamalt oddalið!

## FAKTA UM DYSTIN

**KÍ-Skála 0-2 (0-1)**
0-1: Hanus Thorleifsson 25.
0-2: Jónhard Frederiksberg 58.
**Dómari:** Petur Skarðenni
**KÍ:** Karstin Joensen - Jan Andreassen (Arnhold Joensen, 46.), Niclas Niclassen, Ovi Nysted, Eyðun Klakstein - Kristoffur Jacobsen, Høgni Madsen, Atli Danielsen, Heðin á Lakjuni - Erling Fles (Julian Samuelsen, 80.), Hjalgrím Elttør
**Gult kort:** Niclas Niclassen, Heðin á Lakjuni, Høgni Madsen
**Skála:** Vlada Filipovic - Janel Gorgonaru, Pætur Dam Jacobsen, Rúni Rasmussen, Iulian Florescu - Nenad Stankovic, Pauli G. Hansen, Bjarni Jørgensen, Hanus Thorleifsson - Jónhard Frederiksberg (Rói Jacobsen, 90.), Bogi Gregersen (Milic Corcic, 80.)
**Gult kort:** Bogi Gregersen

# Johan var stak væl nøgdur

**Skála venjarin heldur ikki, at hansara spæld upp til sítt besta, og hann hevði ikki ætlað at havt nakran av nýggju monnunum á liðnum**

SKÁLA

*Johan Nielsen*

At vinna 2-0 í Klaksvík er ikki so galið. Og serliga ikki tá ið havt verður í huga, at Skála ongantíð áður hevði megnað at fingið fult har norðuri.

Johan Nielsen, Skála venjarin, sum í fjør megnaði at fáa liðið frá at vera botnlið og til at vera har, sum tað er hugaligt at kappast, tykist aftur í ár at hava fingið Skála at hoyra til millum tey mest áhugaverdu.

- Spælið hekk í løtum væl saman, men eg haldi ikki, at vit kunnu siga, at tað var støðugt samanhangandi. Men okkara menn stríddust væl, teir spældu seg til fleiri góðar møguleikar, og tá ið teir megnaðu at halda mótstøðumonnunum burturi frá at gera mál, so var tað nóg mikið, at teir skoraðu tvær ferðir, staðfestir Skála venjarin.

Tá ið Skála sunnudagin var í Klaksvík, høvdu teir ongan av nýggju spælarunum í hópinum. Týskvøldið vóru teir allir tríggir við. Á veg til Klaksvíkar fingu skálamenn boð um, at loyvini nú vóru í lagi.

Høgri vongverjin, Janel, og málverjin, Filipovic, vóru millum teir fyrstu ellivu, meðan Milic Corcic varð skiftur inn.

*Hevði tú tvær uppstillingar í høvdinum, tá ið tú fyrireikaði teg til týskvøldið?*

- Nei, eg hugsaði bara um eina uppstilling. Satt at siga ætlaði eg ikki, at nýggju spælararnir skuldu vera á liðnum. Men Eugen Voda, sum er málmansvenjari og sum hevur vart málið í trimum teimum fyrstu umførunum, helt, at tað var best, at nýggi maðurin slapp at royna seg. Ætlanin var, at Bárður Danielsen skuldi vera vongverji í høgru, men hann varð skaddur undir upphitingini, og so var einki annað at gera enn at geva Janel møguleikan, greiðir Skála venjarin frá.

Í fimta umfarinum skal Skála á heimavølli ímóti VB royna at halda tørn um oddasessin.

# KÍ leggur trýst á seg sjálvt

**Liðformaðurin ásannar, at avrikið var alt annað enn gott móti Skála, og at úrslitið ber við sær, at KÍ er undir trýstið, tá ið teir fara í Gundadal**

KÍ

*Jóannes Hansen*

Klaksvíkingar vóru í ringum skørum, tá ið teir fóru til hús í góðveðrinum týskvøldið. Glottin var, at uppgerðin móti Skála var avgreidd í fínum líkindum og ikki í illveðrinum, sum leikaði í sunnudagin. Hvat tí fótbóltsliga viðvíkur vóru so at siga eingir glottar.

- Hatta var vánaligt. Vit løgdu væl fyri, og tað hevði kanska tikið seg heilt øðrvísi upp, um vit høvdu fingið mál beinanvegin, heldur KÍ liðformaðurin, Atli Danielsen.

*– Hví mistu tit alt á gólvið?*

- Eg haldi, at Skála var betri skipað. Teir vóru støðugt yvirmannaðir á miðvøllinum, og teir fluttu seg væl og arbeiddu betri fyri hvørjum øðrum, enn vit megnaðu. Tíverri vunnu vit ikki returbóltarnir, sum eru so týdningarmiklir at vinna, tá ið konseptið er, sum tað var hjá okkum. Tá ið tú sjáldan hevur bóltin, verður alt meiri torført, heldur Atli Danielsen.

KÍ hevur bara fingið eitt stig burturúr tveimum teimum síðstu royndunum á heimavølli, og tað leggur trýst á undan útidystinum í Gundadali ímóti B36.

- Talan verður sjálvandi um heilt øðrvísi uppgerð, og B36 hevur víst, at teir eru á veg rætta vegin. Vit hava nógv at hugsa um, bæði í álopspartinum og í verjuni. Hetta var fyrsta ferðin, vit ikki hava skorað, og mótstøðumenninir hava í øllum dystunum skorað ímóti okkum. Tað kostar, at mál fara ígjøgnum, tá ið vit sjálvir ikki megna at gera mál.